# Landaskomm

**Íslendski venjarin sigur, at Ísland má og skal hava sjey stig burtur úr teimum báðum næstu dystunum**

LANDSDYSTUR
Álvur Haraldsen/
*Jákup Mørk – Reykjavík*

Tað verður nógv gjørt burtur úr landsdystinum ímóti Føroyum í íslendsku miðlunum. Eina mest soleiðis, at vónirnar eru settar eftir einum tryggum sigri, men heilt so einfalt eru tað tó tey fægstu, sum rokna við at dysturin verður.,

Íslendski landsliðs-venjarin, Asgeir Sigursson hevur eisini ávarað ímóti nakrari undirmetin av føroyski mótsøðuni, men samstundis leggur hann áherslu á, at hetta er ein dystur, sum skal vinnast.

- Tað er einki minni enn landaskomm, um vit ikki vinna hendan dystin, sigur Asgeir, og hann sigur víðari, at inniverandi undankapping hevur alstóran týdning fyri íslendskan fótbólt.

- Hóast vit ikki fáa gjørt so nógv við fremstu liðunum í bólkinum hesa ferð, so er tað sera týdningarmikið, at vit standa okkum væl. Ísland skal halda sær í triðovasta styrkisbólkinum í Europa, og tað er fyrst og fremst, sum vit mugu tryggja okkum komandi dystirnar. Tað krevur so helst eisini sjey stig í teimum trimum komandi dystunum, sum eru ímóti Føroyum, Litava og so aftur Føroyum, og tað er so tað, sum vit mugu fara eftir.


*Ásgeir Sigursson sigur, at talan er um landaskomm, um Ísland ikki vinnur á Føroyum leygardagin*

### Framrættað

Annars tykist eingin í íslendsku miðlunum at gita, hvussu liðið fer at síggja út. Eftir at íslendingar í nógv ár hava spælt í eini fastlæstari 4-4-2 skipan, tykist Asgeir ætla at broyta hetta til eina 3-5-2, og móti Føroyum verður talan kanska um somikið framrættað spæl, at talan í veruleikanum verður um tríggjar áleyparar.

Spurningurin er so, hvussu leiklutirnir hjá hesum verða býttir leygardagin, men eftir tí, sum vit hava skilt, so verða tað hesir ellivu, sum fara á vøllin:

Árni Gautur Árason – Guðni Bergsson, Herman Hreiðarsson, Arnar Viðarsson – Arnar Grétarsson, Rúnar Kristinsson, Brynjar Bjørn Gunnarsson, Jóhannis Guðjónsson – Eiður Smári Guðjohnsen, Arnar Gunnlaugsson.


*Eiður Smári Guðjohnsen er stóra stjørnan á íslendska liðnum, og hann verður í øllum førum millum teir fyrstu ellivu*

# Gott at vera aftur

**Eftir tvey ára fráveru er Johan Byrial Hansen nú aftur partur av føroyska landsliðshópinum, og hetta er avgjørt nakað, sum hann fegnast um**

LANDSDYSTUR
*Álvur Haraldsen/*
*Jákup Mørk – Reykjavík*

Tað var í Slovenia fyri hálvum øðrum ári síðani, at Johan Byrial Hansen spældi sín higartil seinasta landsdyst fyri Føroyar. Avrikið ta ferðina var kanska ikki millum tey bestu, og eftir dystin varð spurningurin reistur, hvørt hetta kanska var seinasta ferðin, at útisetin hevði verið á føroyska liðnum.

Ta ferðina æt landsliðsvenjarin Allan Simonsen, og síðani hesin varð skiftur út við Henrik Larsen, hava boð ikki verið eftir Byrial. Kanska skiljandi, tá Jón Rói Jacobsen mest sum hevur bitið seg fastan í verjupartin, men kortini hevur hann tó hvørja ferð verið millum teir, sum hava verið nevndir, tá tosað hevur verið um møguligar avloysarar í verjuni. Tá nýggir verjuleikarar skuldu finnast til dystirnar móti Kasakhstan, var Byrial tó ikki á navnalistanum, og tí mundu tey flestu avskriva hann eftir hetta, men nú eru tó kortini boð eftir honum, og sjálvur sigur leikarin eisini, at hetta er nakað, sum hann gleðist um.


*Johan Byrialn Hansen er nú aftur partur av føroyska landsliðnum*

- Tað er rætt, at eg kanska var nóg so langt vekk, tá eg ikki fekk boð til dystirnar móti Kasakhstan. Eg skal ikki siga, at hevði avskrivað alt sjálvur, men eg roknaði í øllum førum møguleikan fyri rættiliga fjarðan. Men tað er ikki so nógv at gera við tað. Tað er venjarin, sum ger av, hvørjir sleppa við, og var eg ikki millum hesar, so mátti tað vera tað.

Spurdur, hvørt hann kortini hevur havt samband við Henrik Larsen hesi bæði seinnu árini, sigur Johan, at tað hevur hann ikki.

- Eg havi í øllum førum ikki hoyrt so nógv, men eg gangi út frá, at hann hevur tosa við venjaran hjá mær, Kent Nielsen, og kanska hevur hann eisini sæð onkran dystin, men eg havi so ikki hoyrt meira enn tað.

Hvørt Johann so verður millum teir fyrstu ellivu leygardagin, er ein onnur søga. Sjálvur sigur hann seg so einki hava fingið at vita.

- Tað er venjarin, sum ger tað av. Hann velur teir ellivu, sum hann heldur verið bestar, og so má eg bara vísa undir venjing, at eg skal verða millum hesar. At eg so skuldi fáa ein lítlan snudd í gjár, var eitt sindur keðiligt í so máta, men fái eg møguleikan, so eri eg klárur, sigur Byrial at enda.

Vikuskifti
Nr. 106 • leygardagur • 7. juni 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Josef Stalin – eitt fimmti ára minni
7. partur

Lesið síðu 4, 5 & 6

# Tónlistarlig samtíðarsøga í løttum tóna

Kim Larsen er seinnu árini nevndur tjóðskald í Danmark. Fáur hevur sum hann savnað danir og eisini onnur, t.d. føroyingar, um felagssang við sangum úr samtíðini. Seinasta avrik hansara er fløgan Sange fra glemmebogen, har hann hevur hugt aftur á og við kønari hond og kærleika tikið fram gamlar sangir og vísur og latið í nýggjan búna. Út er komin bók um mannin, nevnd Larsen, og eisini er bók um bólkin Gasolin', har hann fekk fótin fastan á tónleikapallinum

TÓNLEIKASØGA
*Dagfinn Olsen*

Kim Larsen er kendur av hvørjum mannsbarni í Danmark, og eisini í Føroyum tykist hann vera fólkaogn.

Við ósvikaligum ansni fyri góðum og íoyrafallandi løgum og teksti, ið sveimar, men tó ikki missir lurtaran, hevur Kim Larsen nú í eini 30 — 35 ár staðið á palli og malið á plátu, bandi og fløgu. Til gleði fyri tey flestu.

Í fjør kom bókin Larsen, ein vælskrivað ævisøga um mannin, sum av t.d. Ekstrablaðnum er útnevndur tjóðskald dana. Hóast Larsen og blaðið hava verið í drúgvum stríði, so fekk hann henda heiður.


*Bøkurnar (Gasolin' — masser af succes og Larsen) eru spennandi lesnaður og kunnu avgjørt viðmælast, hevur ein áhuga fyri Larsen, tónleiki og samtíðarsøgu. Kim Larsen er ein stjørna, sum enn lýsur sterk, hóast komin upp í árini. Kim Melius Flyvholm Larsen er føddur 23. oktober í 1945*

### Gas

Tað er danin Peter Bundgaard, ið hevur skrivað ævisøguna um Kim Larsen og hann gav í 1993 eisini út søguna um Gasolin' — Masser av Succes. Peter Bundgaard er ikki ein og hvør, tá tað kemur til Gasolin' og Kim Larsen. Bundgaard hevði tætt samband við bólkin Gasolin'. Hann er hondteknari og skrivar eisini um tónleik og tekur myndir. Hann hevur greitt úr hondum mong bóka- og plátuumsløg. Í sjeytiárunum var hann tætt knýtur at Gasolin', eittnú við at greiða úr hondum plátuhúsar. Hann hevur eisini verið við til at skrivað Politikens Rockleksikon (1992) og hann hevur eisini skrivað ævisøguna um vinmannin Dan Turèll, rithøvund.

Eyðkent fyri nevndu ævisøgubøkurnar er, at tær eru skrivaðar av einum, sum hevur innlit og sum stendur persónum (og bólki) nær.

Eisini eru tær skrivaðar í einum løttum tóna. Og tað er hóskandi, tí felags fyri tónleik og skaldskapin, ið verður viðgjørdur, er at hann er eyðkendur við at vera samtíðarskaldskapur og yrkingar, ið ikki seta nakran eftir í háfloygdum orðingum, ið missa lurtara ella lesara.

Kim Larsen, bæði við og eftir Gasolin', er gerandisskald, sum við orðingum, sum maðurin á gøtuni kennir, dugir at lýsa gerandistrupulleikar og kenslur. Kanska júst av hesi orsøk er hann nevndur tjóðskald; fáur kann sum hann savna bæði høg og lág, ung sum eldri, um tónleikin og sangin.

### Upp og niður

Í bókini Larsen, lýsir Bundgaard lívsleiðina hjá Kim Larsen. Frá barnaárunum og tíðini á háskúla, har ansurin fyri góðum guitarspæli og góðum og gomlum donskum yrkjarum varð vaktur.

Sagt verður frá tíðini sum læraralesandi og ta stuttu tíðina, ið Kim Larsen starvaðist sum slíkur. Tíðini við tilhaldi í sambýlum av ymsum slag í sjeytiárunum. Hóast giftur fyrstu ferð og við barni, so valdi hann ótryggu tilveruna sum sangari. Bólkurin Gasolin' sær spakuliga dagsins ljós og...restin er søga, sum tikið verður til.

Bókin Larsen er ein ferð við Kim Larsen. Hansara lív á palli og heima — privat. Í heimlandinum og tiltikna túrinum í USA, har eydnan skuldi roynast, men ikki var at finna.

Heima aftur fyrst í áttatiárunum kom gamalt hugskot á arbeiðsborðið. Við hjálp frá vinmanninum Erik Clausen gjørdist hetta til filmin "Midt om Natten", ið kendi filmstjórin Erik Balling leikstjórnaði.

Síðani eru túrar upp og niður, bæði á palli og í privatlívinum. Hjúnaskilnaður og fløgur og tiltøk, sum ikki eydnast sum ætlað, men Larsen er ongantíð horvin av pallinum, hóast manga harða umtalu í miðlum.

Síðsta bragdið, sum tykist hava staðfest støðuna hjá Larsen á danska stjørnuhválvinum, er fløgan Sange fra Glemmebogen, har hann tekur fram gamlar sangir og vísur, sum hann er góður við. Og sum fólk eru góð við og hava endurtikið til sín í haminum, sum Larsen hevur givið teimum.

Spennandi lesnaður um ein persón, eina stjørnu, sum eisini hevur glógvað í Føroyum síðani byrjanina. Ein stjørna, sum enn lýsur sterk, hóast komin upp í árini. Kim Melius Flyvholm Larsen er føddur 23. oktober í 1945 í Keypmannahavn.

Stuttligt er kanska hjá áhugaðum at merkja sær, at sonur Kim Larsen, Sylvester, hevur givið sína fyrstu fløgu út (í búnum aldri) og er ikki heilt ólíkur pápanum, serstakliga á tekstsíðuni.

Bøkurnar (Gasolin' — masser af succes og Larsen) eru spennandi lesnaður og kunnu avgjørt viðmælast, hevur ein áhuga fyri Larsen, tónleiki og samtíðarsøgu.